# Kaj Leo Johannesen skal vigast av nýggjum

**Nú sambandsflokkurin enn einaferð hevur fingið ein lúsing á einum vali, fer flokkurin at taka støðu til um Kaj Leo Johannesen er tann rætti at vera formaður floksins**



FORMANSVAL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Skal Kaj Leo Johannesen halda fram sum formaður í sambandsflokkinum.

Hetta er ein spurningur, sum flokkurin fer at viðgera í kjalarvørrinum á tí sera vánaliga fólkatings-valinum týsdagin, har flokkurin gjørdust minstur av teimum fýra stóru flokkunum.

Í Útvarpinum mikudagin róði gamli oddamaður floksins, Edmund Joensen, uppundir, at flokkurin átti at viðgera leiðsluspurningin.

Eisini Johan Dahl, tingmaður sambandsfloksins úr Suðuroy, heldur, at tað eru viðurskifti í sambandsflokkinum, sum tað ikki slepst undan at endurskoða.

– Vit mugu seta okkum niður at greina, hví tað gekk so illa, sigur hann.

Tá ið vit spyrja hann, hvat hann meinar við ítøkiliga vísur hann til samrøðuna, sum Útvarpið hevði við Edmund Joensen á mikudagin.

– Har haldi eg, at tað varð sagt nokk so greitt, hvørji stig tað er neyðugt at taka. Sostatt sipar hann eisini til tað, sum Edmund Joensen rør framundir, at tað verður neyðugt at endurskoða formansskapin í flokkinum.

– Vit mugu staðfesta, at vit hava ein trupulleika. Kanska er tað ein leiðslutrupulleiki. Kanska er tað uppleggini til valini, sum ikki eru nóg góð. Men teimum hevur leiðslan eisini høvuðsábyrgdina av. Tí eru alt hetta viðurskifti, sum tað verður neyðugt at endurskoða.

– Í øllum førum mugu vit staðfesta, tí tað er í Suðurstreymi, haðani leiðslan er, at valúrslitið ferð eftir ferð svíkur so dyggiliga og rennur flokkin um koll.

Er Kaj Leo Johannesen rætti formaðurin hjá sambandsflokkinum?

– Tað fari eg ikki at viðgera alment. Tað er ein viðgerð, sum hoyrir heima innanfloks. Men skulu vit brúka valúrslitið sum barometur, er tað ikki nóg gott. Men tað er ikki bara formaðurin, sum hevur skyldina. Og eitt er vist og tað er, at sambandsflokkurin tolir ikki fkeiri brestir av hesum slagnum.

### Hava givið bakslag

Johan Dahl sigur, at tað er heilt avgerandi fyri flokkin, at undirtøkan í Suðurstreymoy verður bygd uppaftur. Tað er nógv størsta valdømi í landinum og er tí rættiliga avgerandi fyri, hvussu samlaða valúrslitið verður.

*– Rumblið, sum hevur verið í flokkinum, hevur skatt okkum. Og tað er eisini ein sannroynd, at upprunin til rumblið, er Suðurstreymoyar valdømið og tað er hetta valdømið, sum so dyggiliga tapti valið, sigur Johan Dahl, tingmaður fyri sambandsflokkin*

Hann her heilt sannførdur um, at tær avgerðir, sum eru tiknar í valfelagnum í Suðurstreymoy, hava givið bakslag.

Hann hugsar bæði um tað, sum oddafólk flokksins søgdu og skrivaðu, tá ið hann noydust úr landsstýrinum og hann hugsar eisini um tað, sum fór fram, tá ið Heðin Mortensen varð koyrdur, ella kroystur úr flokkinum.

– Eg haldi framvegis, at tað var eitt mistak, at koyra Heðin Mortensen úr flokkinum. Ein átala átti at verið nóg mikið, tí at koyra ein lim úr flokkinum, er eitt so stórt stig, at tað stendur als ikki mát við "brotsverkið" hjá Heðin Mortensen.

– Uppstillingin í Suðurstreymoy hevur verið vánalig og tað kann bara merka, at valevnini ikki vóru tey røttu. Eg ivist ikki í, at Heðin Mortensen hevði kunnað drigið nakrar atkvøður afturat til flokkin, sigur Johan Dahl.

– Tað er heilt skilligt, at rumblið, sum hevur verið í flokkinum, hevur skatt hann. Og tað er eisini ein sannroynd, at upprunin til rumblið, er tað valdømið, sum so dyggiliga tapti valið. Og tað er Suðurstreymoy og harvið allur flokkurin, revsaður fyri.

Annars ynskir Johan Dahl teimum valdu fólkatingsmonnunum, Anfinni Kallsberg og Høgna Hoydal hjartaliga tillukku við valinum og eina hepna hond við arbeiðnum og góðan arbeiðshug.

### Neyðugt við støðufesti

Sostatt slepst ikki undan, at flokkurin fer at viðgera leiðsluspurningin, hóast Utvarpið mikukvøldið kundi boða frá, at valfelagið í Suðurstreymoy og í Eysturoy, sum eru tey størstu, stuðla formanninum,

Sjálvur hevur Kaj Leo Johannesen boðað frá, at hann hevur ongar ætlanir um at taka seg sefg aftur sum formann.

Hann vísir á, at tað er neyðugt við støðufesti í flokkinm og tað fæst ikki við at skifta formann annaðhvørt ár.

Hann heldur eisini, at hann eigur at fáa eitt rímiligt skotbrá at fáa flokkin á føtur aftur.

Higartil hevur hann sitið eitt ár og tað heldur hann er alt ov lítið.

# Veljarin vil ikki tveita atkvøðuna burtur

**– Tað hevði ærligari mótvegis veljarunum at tað bara vóru eini fýra fimm valevni á hvørjum lista til fólkatingsvalið, heldur løgmaður**

UPPSTILLING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Úrslitið av fólkatingsvalinum týsdagin er ein greið ábending um, at vit eiga at umhugsa av nýggjum, hvussu listarnir til fólkatingsvalið skulu mannast.

Tað heldur Jóannes Eidesgaard, løgmaður.

Hann sigur, at valið týsdagin er eitt greitt tekin um, at veljarin vil ikki tveita atkvøðuna burtur við at seta krossin við valevni, sum hann veit, ikki fara á fólkatingsval kortini.

Hann sipar til sítt egna val, har hann fekk góðar 1100 atkvøður á fólkatingsvalinum hesuferð. Á seinasta fólkatingsvalið fekk hann yvir 3000.

– Hetta taki eg sum eitt tekin um, at veljarin vil ikki velja meg, tí eg hevði ikki farið á fólkating kortini. Tí snúði valið seg meiri um, hvør fór at verða nummar tvey á javnaðarlistanum.

– Allir landsstýrismenninir og løgmaður stillaðu upp til valið, men tað var ógvuliga smábýtt við atkvøðum til tey.

– Hetta kemst helst av, at veljarin veit, at tað kann gera tað sama at seta krossin við tey, tí tey fara ikki á fólkating kortini.

### Lítið virðiligt

Nú er støðan tann, at nógvir flokkar hava nøkur og tjúgu valevni á listanum.

– Tað ger, at tað eru so ómetaliga nógv av teimum, sum fáa ógvuliga fáar atkvøður. Samstundis hava flokkarnir ongan møguleika at føra tey fram og tey flestu av valevnunu.

– Hetta er ikki ein virðilig støða at setahesi valevni í, bara fyri at hava nógv nøvn á listanum, heldur Jóannes Eidesgaard.

Hann tekur tí undir við tankanum um at flokkarnir hereftir skulu hereftir bara stilla eini fýra, fimm valevni upp á hvørjum lista til fólkatingsvalið.

– Tað hevði verið rætt at allir flokkarnir avtalaðu, at teir skuldu ikki stilla meiri enn eini fýra fimm valevni upp á hvørjum lista og at hetta vóru valevni, sum vóru sinnað at fara á Fólkating, skuldu tey verðið vald.

Løgmaður heldur, at tað hevði verið ærligari mótvegis veljarunum

Hann kundi tí hugsa sær eitt alment kjak um hesi viðurskifti.




MYND AV LØGMANNI
*– Veljarin vil ikki tveita atkvøðuna burtur og tí hevði tað verið ærligari bara at havt fýra ella fimm valevni á hvørjum lista, heldur løgmaður*